## Hallur róstur í Aberdeen

17 ára gamli Hallur Hansson, sum í hesum døgum er við á føroyska U21 landsliðnum, er ein spælari, sum ítróttarstjórin í Aberdeen hevur stórar vónir til. Willy Miller sigur, at Aberdeen hevur lagt nógv í at menna ungar spælarar, og úrslitini eru nú farin at síggjast. Miller sigur millum annað, at Hallur Hansson er ein spælari, sum kann vinna inn í 1. liðshópin hjá Aberdeen innan langa tíð.



## Djourou úti í hálvt ár

Verjuspælarin Johan Djourou, sum spælir fyri Arsenal, verður ikki at síggja á vøllinum næsta hálva árið. Sveisiski landsliðsspælarin hevur fingið ein álvarsaman knæskaða, og hann er skurðviðgjørdur. Nú bíðar ein langur steðgur fyri framman, har Djourou fyrst skal hvíla knæið og síðani styrkja tað aftur til fótbólt á hægsta stigi.

Føroyar-Moldova 1-1 (1-1):

# Orsøk at iðrast



Kristoffur Jacobsen er einsamallur við málverjanum, og so er føroyska U21-landsliðið enn eina ferð ávegis móti altjóða stigi
Mynd: Álvur Haraldsen

**Føroyskur fótbóltur skal stórfrøast um øll altjóða stig. Alt annað er óhoyrt. Men tað var ikki júst kenslan, sum tey flestu sótu við í Gundadali seinnapartin leygardagin**




Uni Holm Johannesen

U21-landsliðið hevur verið ein sólskinssøga frá fyrsta degi. Liðið hevur seinastu tvey árini víst vegin í altjóða fótbólti og tryggjað føroyskum fótbólti fleiri stig. Leygardagin varð aftur prógvað, at føroyingar tíma at stuðla liðnum. Og við 550 áskoðarum í rygginum stríddu ungu føroyingarnir seg til ein javnleik móti Moldova leygardagin. Hóast tað er fantastiskt hvørjaferð, at Føroyar vinna stig, var tað ikki reiðuliga kenslan.

U21-landsliðið hevði møguleikan, summi mettu uppiborið, at vinna øll stigini í Gundadali. Tí gestirnir fingu ein mann útvístan seinastu løtuna, og føroyingar høvdu verið við yvirlutan í løtum av dystinum, men eydnaðist tað ikki at gagnnýta støðuna.

### Raktu tvørtræið

Men tað er lætt at iðrast eftir dystin. Tí fólk høvdu sanniliga funnist at, um venjararnir góvu leikarunum leysar teymar, og Moldova hinvegin hevði fingið sigursmálið. Tí var tað eisini ein skila avgerð at binda um heilan fingur.

Ikki tí. Føroyar vóru sigrinum nær. Tá fimm minuttir restaðu í av fyrra hálvleiki var 18 ára gamli Róaldur Jacobsen óansaður. Staddur fimm metrar frá brotssteigarmarkinum smekkaði hann til, men málverjin fekk fingrarnar á. Bólturin brast í tvørtræið og aftur í spæl.

Moldova kom væl frá byrjan í hesi undankappingini. Liðið vann í fyrsta umfarinum við 1-0 á Letlandi. Men í føroyska høvuðsstaðnum um vikuskiftið vóru teir ikki serliga sannførandi. Júst sum á føroyskum liðnum, so hevði eingin dirvið at bjóða av og leypa hvøkk á mótstøðuliðið. Úrslitið var, at ferðin á bóltinum gjøgnumgangandi var lág, og nærdystirnir fleiri.

### Málini

Moldova legði seg á odda miðskeiðis í fyrra hálvleiki. Heri Nesá, sum var vongverji í vinstru, varð yvirspældur, og tá innleggið